## Tekniska umsiting í Klaksvík mennast



Tvey nýggj starvsfólk eru nú sett á Teknisku umsiting. Ein umhvørvisleiðari og ein landmálingsteknikari, skrivar heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu. Hanna Dalsenni (til høgru á myndini) er sett í starv sum landmálingsteknikari í Klaksvíkar Kommunu. Høvuðsuppgávan hjá Hannu verður at kortleggja Klaksvíkar Kommunu. Ynskið hjá Teknisku umsiting hevur leingi verið at dagført avsetingar- og kortleggingararbeiðið í kommununi, og hetta verður nú veruleiki. Síðani skal hetta arbeiðið integrerast í teldukortskipanina hjá kommununi, og framyvir kunnu borgarar fáa fesk kort útflýggjaði í Miðlan ella heinta kort niður frá heimasíðuni. Á hesum kortum fer at bera til at síggja gøtuljós, vatn- og kloakkleiðingar í kommununi. Tórhild Bjarkhamar (til vinstru á myndini) er sett í starv sum umhvørvisleiðari í Klaksvíkar Kommunu. Høvuðsuppgávan hjá Tórhild verður at skráleggja umhvørvisøkið og gera virkisætlanir. Ynski frá Teknisku umsiting er at fáa skipaði viðurskifti innan ymsu umhvørvisgreinarnar og harumframt at skipa fyri munadyggum umhvørvisátøkum. Heilsufrøðilig eftirlit við eitt nú handlum, áum og oljutangum og harumframt at viðgera umhvørvisbágar í kommununi. Tórhild verður eisini skrivari í Heilsu- og Umhvørvisnevndini.

# Lat teg ikki rúsa av egnari viðgongd

*»Lat ongantíð »grádigheit« fáa fastatøkur á tær við tí úrsliti, at tú gert býttisligar íløgur, ella íløgur, har tú ikki hevur mett um, hvat úrslitið verður, um ikki gongur sum væntað.«*

*»»Disciplinur« er lyklaorðið hjá tær sum íleggjari. Set ongantíð hús og heim og familjurnar vælferð í veg fyri at tjena pening. Tað er ikki tað vert.«*

*»Hugsa teg væl um*
*Kunna teg um marknaðin og tey partabrøv, ið verða handlað á marknaðinum*
*Syrg fyri eini nøktandi váðaspjaðing*
*Ger tínar íløgur eftir førimuni*
*Minst til, at partabrævaíløgur í veruleikanum skulu vera langtíðaríløgur*
*Hav disciplin og lat teg ikki fanga av »grádigheit««*



**»Tey fólk, ið peningaliga skjótt eru blivin rík, eru tey somu, sum skjótt gerast fátøk.« Aftan fyri hesi orð goymir seg áminningin um, at tú ongantíð skalt lata teg rúsa av egnari viðgongd (succes) og harvið gera íløgur við tí sannføring, at tú er fullkomin og ikki kanst gera mistøk. Ert tú náddur har til, er vegurin til húsagang vísur segði Sverri Justinussen, leiðari á íløgudeildini hjá Eik, tá vinnarar av íløguspæli vórðu kunngjørdir**

**FRAMLØGA Í MIÐLAHÚSINUM MÁNAKVØLDID 14. JANUAR 2008**

Tað hevur verið lætt og nærmast vandaleyst at verið íleggjari á partabrævamarknaðunum seinastu 4 – 5 árini. Eftir stóra skrædlið á partabrævamarknaðunum árini beint eftir árhundraðskiftið eru partabrøv hækkað í kursi næstan uttan íhald. Sum íleggjari hevur tú næstan ikki kunna sloppið undan at vunnið pening á marknaðunum. Góður framburður í heimsbúskapinum saman við lutfalsligari lágari prísáseting á partabrøvum mált uppá lyklatøl hevur verið orsøkin. Amerikanski búskapurin kom av álvara aftur í snúningar eftir rakárini í 2000, 2001 og 2002. Búskapirnir í fjareystri við Kina á odda hava upplivað ein vøkstur, sum ikki er sæddur fyrr. Globalisering gjørdist av álvara eitt tema. Sjálvt týski búskapurin og harvið eisini búskapurin í evruøkinum sum heild, kom loksins í snúðningar eftir at hava ligið í andaleypi næstan síðan Berlinmúrurin fall. Framburðurin merkti, at inntøkugrundarlagið og virðisskapanin í børsskrásettu fyritøkunum støðugt vaks og harvið eisini prísásetingin og marknaðarvirðið.

Myndin er tó vend seinasta góða hálva árið. Longu fyri einum ári síðani byrjaðu ávísir trupulleikar at hómast í USA. Húsa- og íbúðarmarknaðurin, sum nærmast hevði verið euforiskur hesi góðu árini, orsakað av góðum búskaparligum framburði, lágari rentu og lagaligum lánitreytum, byrjaði at ridla. Tá farið var um hálvárskiftið í fjør, byrjaði støðan at gerast hættislig og var hetta byrjanin til sokallaðu sub-prime kreppuna á fíggjarmarknaðunum, ið gjørdist til eina veruliga kredittkreppu við eftir øllum at døma álvarsligum realøkonomiskum fylgjum. Hetta hevur sanniliga merkt partabrævamarknaðin í 2007, sama tíðarskeið, ið partabrævaspælið, ið vit í kvøld leggja lok á, hevur koyrt.

Hvar standa vit so nú? Seinastu mánaðirnar er sjón fyri søgn: Støðan í amerikanska búskapinum er bara vorðin verri: húsamarknaðurin er bara versnaður, brúkaraálitið og vísitøl fyri vinnuna peika øll bara niðureftir, og høgi oljuprísurin er eitt haft um beinini hjá bæði vinnuni og vanliga brúkaranum. Ein beinleiðis recession er vorðin alt meira sannlík (def. 2 ársfjórðingar á rað við 0 ella negativum vøkstri) Amerikanski tjóðbankin við Bernanke á odda hevur viðurkent støðuna. Síðan august mánað er leiðandi rentan lækkað við 1% stigi í trimum umførum, og nú verður skrúvað upp fyri ferðini. Á rentufundinum seinast í mánaðinum verður rentan sannlíkt lækkað við 0,50% stigi, og fleira lækkingar eru ivaleyst ávegis.

Gongdin í amerikanska búskapinum kemur heilt víst at hava negativ árin á heimsbúskapin sum heild. Hinvegin er týdningurin av amerikanska búskapinum í heimsbúskaparligum høpi ikki eins stórur sum fyri bara nøkrum árum síðani. Klára búskapirnir í Kina og fjareystri at halda dampinum uppi, so verða heimsbúskaparligu árinini av kreppuni í USA ikki eins stór og tey kundi blivið. Spurningurin er bert, um Kina klárar at halda dampinum uppi!

Ofta verður sagt, at partabrævamarknaðurin er framman fyri sína tíð. Vit kunnu í hvørt fall staðfesta, at flestu partabrævamarknaðir er longu falnir lutfalsliga nógv, síðan teir vóru upp á tað hægsta í 2007 (OMXC20 -18,5%, OMXS -25%, OBX -15% osv.). Hvussu kemur at ganga komandi mánaðirnar velst um, hvussu álvarsligur búskaparligi slakkurin verður, hvussu longi hann kemur at vara, og hvussu stemningurin generelt verður í marknaðinum. Vert er tó at bíta merki í, at partabrævamarknaðirnir í flestu førum finna støðufesti aftur og hækka, áðrenn búskaparligu konjunkturarnir venda aftur. Hetta tí, at prísásetingin á partabrøvum í veruleikanum er grundað á framtíðarútlit. Harafturat er vert at bíta merki í, at partabrøv mál uppá lyklatøl ikki eru dýr samanborið við støðuna afturi í 2000, áðrenn sokallaða IT-boblan brast.

Endamálið við partabrævaspælinum, sum fleiri túsund fólk hava luttikið í, var fyrst og fremst at skapa áhuga fyri partabrøvum og partabrævaíløgum. Í einum partabrævaspæli kanst tú uttan váða gera tær nakrar royndir av, hvørjar møguleikar tú hevur á partabrævamarknaðinum, og ikki minst hvørjar vandar tú til eina og hvørja tíð stendur